# Sparikassin við nýggjari skipan




*Johannes Ejdesgaard frá KT-deildini sýnir fram nýggju limagreiðsluna*

*Mynd: Bárður*

**Føroyar Sparikassi hevur ment eina nýggja limaskipan, sum fer at automatisera innkrevjingina hjá feløgum**

LIMAGREIÐSLA
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

- Við hesi skipan kunnu feløg spara útreiðslur í sambandi við innkrevjing av limagjaldi, og kassameistarin kann spara nógva tíð í umsiting, sigur Johannes Ejdesgaard á KT-deildini.

Nýggja skipanin verður nevnd limagreiðslan, og hon er ætlað øllum feløgum, ið hava ein kostnað og krevja limagjald. Hetta kunnu vera ítróttarfeløg, eigarafeløg, samkomur og áhugafeløg.

Við hesi skipan sleppur felagið undan at krevja limagjald inn við girokortum, tí at rokningin fyri limagjald verður send til heimagreiðsluna hjá liminum (um hann væl at merkja hevur eina slíka).

Skipanin er ment í samstarvi við eitt danskt felag, og hetta hevur verið ein hampuliga stór íløga hjá Sparikassanum. Skipanin verður brúkt í Danmark, men hon er rættiliga ókend her heima.

Brúkarin av skipanini skal rinda eitt gjald pr. lim, sum verður koyrdur ígjøgnum skipanina.

- Hetta er væl bíligari enn at senda giro-kort út til allar limirnar, sigur Johannes Ejdesgaard.

Umframt eina limaskrá umfatar skipanin eisini eina gjaldsskipan og eina bókhaldsskipan. Kostnaðurin er tengdur at, hvørjar partar av skipanini, felagið vil nýta.

Feløg, ið nýta hesa skipanina, sleppa undan at gera íløgur í bókhaldsskipanir og tænastur frá teldufyritøkum. Harumframt verður arbeiðið hjá kassameistaranum mikið lættari. Fyri at kanna kostnaðin á limagreiðsluni fyri eitt ávíst felag kann hesin roknast út á heimasíðuni hjá limagreiðsluni, so at tú fært ein nágreiniligt byrjunargjald fyri nýtslu av limagreiðsluni.

- Hetta er ein brúkaravinarlig tænasta, har tú hevur eitt fullfíggjað yvirlit yvir limir felagsins, og tú hevur eisini møguleika at samskifta við limirnar ígjøgnum skipanina.

# Hanni Bjartalíð í Leikalund

Í juli mánaða fer Hanni Bjartalíð at sýna fram list í Leikalund í Klaksvík.
Hanni er serliga kendur fyri sínar naivistisku myndir, sum ofta kunnu minna um stuttligar sjálvsmyndir og lýsingar av gerandisdagin hjá listamanninum. Hann málar oljumálningar, og eitt sum m.a. eyðkennir Hanna Bjartalíð, eru hansara myndarøðir, har fleiri smáar myndir siga eina søgu. Hanni Bjartalíð hevur ígjøgnum árini ment sín egna stíl innan føroyska myndlist, og tað er altíð spennandi at síggja, hvat hann sýnir fram.



*Myndarøðir, sum siga eina søgu, eru vorðnar eitt av eyðkennunum hjá nýskapandi listamanninum Hanna Bjartalíð*

Hanni er føddur í 1968 og er uppvaksin í Klaksvík. Hann byrjaði sum ungur at mála og málaði nógvar myndir, ið lýstu Klaksvíkina og føroysk umhvørvi. Seinni fór Hanni undir útbúgving á Norðurlendska Listaskúlanum í Kokkola í Finnlandi, og tá broyttist stílur hansara til tann nýskapandi og eyðkenda stílin, vit seta í samband við Hanna Bjartalíð í dag.

Umframt at hava sýnt nógv fram her í Føroyum, hevur hann havt nógvar listaframsýningar ymsastaðni Danmark, Finnlandi, Týsklandi og Íslandi, og hevur hann verið sera væl umtóktur.

Hanni Bjartalíð er í dag búsitandi í Lahti, í Finnlandi, har hann hevur nógvar listaframsýningar. Fernisering verður fríggjadagin 08.07.2005 kl. 16.00, og sýningin verður hangandi allan juli mánaða.

Framsýningin er opin soleiðis: Mánadag - mikudag: 10.00-17.30, Hósdag - leygardag: 10.00-23.00, Sunnudag: 15.00-23.00

**ave**

# Føroyskur skipari dømdur í Hetlandi

FISKISKAPUR
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Føroyski skiparin á nótabátinum Ruth fekk hósdagin eina bót áljóðandi 6000 ensk pund fyri at hava givið skeivar upplýsingar um veiðu í írskum sjógvi.

Skiparin hevði upplýst fyri fiskiveiðumyndugleikunum, at teir høvdu fingið eina last av svartkjafti í Norðsjónum, tá teir í veruleikanum høvdu fiskað vestanfyri Írland.

Føroyski skiparin játtaði seg sekan í at hava givið skeivar upplýsingar, og rætturin í Lerwick honum tí eina bót. Hetta skrivar Shetland Times á internetinum.

Ruth, sum er skrásett í Danmark, seldi lastina til eitt virki í Hetlandi fyri 22.280 ensk pund.

ES-nevndin hevur givið loyvi til størri veiðu av svartkjafti í Norðsjónum, har donsk skip kunnu veiða 118.000 tons av svartkjafti, men veiðan í írskum sjógvi er framvegis avmarkað til 9.800 tons.

Verjin hjá føroyska skiparanum legði í rættinum dent á, at skiparin ikki hevði fiskað ólógligt, men at upplýsingarnar, sum vórðu latnar myndugleikunum, vórðu skeivar.

Orsøkin, til at skipið upplýsti, at svartkjafturin varð fiskaður í Norðsjónum, er, at so kunnu tey veiða enn meira í írskum sjógvi seinni á árinum. Á hendan hátt gongur kvotan ikki so skjótt undan.

Ákærin legði dent á, at øll fiskiveiðiskipanin verður undirgravað av fiskimonnum, ið geva skeivar upplýsingar.

Nýtt frá Bókadeildini:

# Krokodillur, Pippi og krimisøgur







Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út smábarnabókina Krokodillur busta ikki tenn eftir Colin Fancy, barnabókina Pippi Langsokkur á Kurrikurriduttoynni eftir Astrid Lindgren og ungdómsbókina Hevnd eftir Mats Wahl.

Krokodillur busta ikki tenn er litrík og stuttlig myndabók um munin á at vera dýr og barn. Tá ið barnið ikki tímur at greiða sær, kann vera stuttligt at vita, at hóast leyvur hava nógv hár, so greiða tær sær heldur ikki. Ken Wilson-Max hevur teknað og týddi úr enskum.

Pippi Langsokkur á Kurrikurriduttoynni er nýggj myndabók við tekningum eftir Ingrid Nyman. Pippi fer at ferðast til Kurrikurriduttoynna saman við Anniku og Tummasi. Bókin er løgd til rættis eftir søgum úr Pippi í Suðurhøvum, sum Turið Sigurðardóttir týddi. Kendu tekningarnar hjá Ingrid Nyman hava fingið lit, men Pippi sjálv er framvegis líka sterk og ger framvegis akkurát tað, hon hevur hug til.

Ungdómsbókin Hevnd er ein sera spennandi krimisøga um, hvør tordi at gera seg inn á Ahmed Sirr. Umframt at vera spennandi er søgan eisini viðkomandi og sera aktuell. Her rillar trúgvin á Gud, her bylgist hugurin at fáa hevnd, og her trívist fremmandahatur. Í hesum meldrinum skulu Fors og starvsfelagar hansara royna at fáa skil í galskapinum og finna út av, hvør drap Ahmed Sirr og hví. Jákup í Skemmuni hevur týtt Hevnd úr svenskum.

**ave**